# ÍF vann greiðan sigur

**VODAFONEDEILDIN** Við støði í góðum snárálopum, og einum sera vælspælandi Nenad Saric, vann ÍF ein uppibornan 4-2 sigur á B68 á Fløtugerði mikukvøldið

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| ÍF | 4 |
| B68 | 2 |

Tað hevur gingið væl hjá fuglfirðingum higartil í landskappinginí, og í dystinum móti B68 vístu fuglfirðingar til tíðir gott fótbóltsspæl. Venjarin hjá fuglfirðingum, Ábraham Løkin, var eisini nøgdur við spælið hjá fuglfirðingum.

– Vit hava fleiri góðar bóltspælarar á liðnum, og tá vit royna at spæla fótbólt, heldur enn at spæla við longum sendingum, hava vit víst at vit kunnu geva øðrum liðum skarpan gang, og tað eydnaðist í dystinum móti B68, segði Ábrahan Løkin.

Ímeðan Ábraham kundi fegnast um sigurin, so var B68 venjarin, Bill Mc Jacobsen, alt annað enn nøgdur eftir dystin. Hann metti B68 til tíðir spældi væl, men at at persónlig mistøk gjørdu sítt til at ÍF vann dystin.

## Saric var eygsýndur

Fuglfirðingar hava fleiri góðar bóltspælarar á liðnum, og mikukvøldið var álopsspælarin Nenad Saric eygsýndur. Umframt at hann skoraði tvey mál í dystinum, so var hann við í nógvum av álopsspælinum hjá heimaliðnum, og var ein konstant hóttan móti B68 verjuni.

ÍF legði seg á odda tíðliga í dystinum, tá Karl Løkin skoraði við beinleiðis frísparki, áðrenn Nenad Saric økti um leiðsluna, tá hann hegnisliga setti bóltin í kassan, eftir skjótt og gott álopsspæl.

Hóast B68 fikk minkað um munin tiðliga í seinra hálvleiki, við máli frá Remi Langgard, so køvdi Høgni Zachariassen vónina hjá toftamonnum við málinum til 3-1, áðrenn Nenad Saric kundi seta krúnuna á verkið, tá hann við góðum langskoti skoraði til 4-1. So gjørdi tað minni at toftamenn enn einaferð fingu minkað um munin, tá eitt langskot hjá Jónleif Højgaard fann leiðina til meskarnar.

Samanumtikið ein fult uppiborin sigur til fuglfirðingar, sum halda sambandið við oddin, meðan toftamenn enn hava fyrstu stigini á útivølli til góðar í ár.

*post@sosialurin.fo*

## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 12 | 8 | 1 | 3 | 28 | 15 | +13 | 25 |
| 2 | HB | 12 | 7 | 4 | 1 | 23 | 14 | +9 | 25 |
| 3 | EB/Streymur | 12 | 6 | 3 | 3 | 20 | 12 | +8 | 21 |
| 4 | ÍF | 12 | 6 | 3 | 3 | 21 | 17 | +4 | 21 |
| 5 | Víkingur | 12 | 4 | 4 | 4 | 21 | 21 | 0 | 16 |
| 6 | B36 | 12 | 3 | 6 | 3 | 18 | 18 | 0 | 15 |
| 7 | B68 | 12 | 4 | 1 | 7 | 20 | 25 | -5 | 13 |
| 8 | B71 | 12 | 3 | 4 | 5 | 12 | 20 | -8 | 13 |
| 9 | AB | 12 | 1 | 5 | 6 | 14 | 23 | -9 | 8 |
| 10 | FC Suðuroy | 12 | 1 | 3 | 8 | 12 | 24 | -12 | 6 |

# EB/Streymur og ÍF lúra

**VODAFONEUPPTAKT** Meðan øll hava lagt NSÍ og HB til merkis, hava fleiri helst yvirsæð EB/Streym, ið hevur vunnið fimm av síðstu seks dystunum og saman við ÍF liggur og lúrir beint aftan fyri hini bæði

Hilmar Jan Hansen

Sunnudagin tekur EB/Streymur hesa ferð ímóti Víkingi, sum hinvegin hevur havt mótbrekku í ein mánað, har tað bara er blivið til eitt stig í fýra dystum, umframt at liðið reyk úr steypakappingini – bara ein dyst frá finaluni. Her má EB/Streymur sigast at vera favorittur.

ÍF, sum eisini liggur framvið har frammi, skal í sínum lagi leygardagin spæla á útivølli á Sandi, har eitt skert B71-lið tekur ímóti, tí liðformaðurin, Símun Hansen, varð útvístur mikukvøldið og nú hevur karantenu.

Grannauppgerð er í Gundadali, har krepppurakta B36 enn eina ferð skal jagstra fyrsta sigurin síðani triðja umfar, nú AB kemur á vitjan.

Ein spurningur undan dystinum er, hvør skal verja AB-málið, nú Heðin Stenberg er skaddur – og tað verður í øllum førum ikki Evrard Ble, ið ger tað hesa ferð, tí hann hevur karantenu sunnudagin.

Í síðsta dystinum skal svingandi og formveika B68 á Svangaskarði taka ímóti niðasta liðnum, FC Suðuroy, ið hevur tapt síðstu seks dystirnar.

## Kristian á Neystabø:

# Sigfríður ikki koyrdur

**FOTBÓLTUR** Eftir javnleikin ímóti B71 sunnudagin gingu leysasøgur um, at B36 hevði sagt venjarunum, Sigfríði Clementsen, úr starvi. Tað avsanna nú bæði formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, og stjórin í P/F FC Tórshavn, sum rekur 1. liðið hjá B36, Bárður Simonsen

Tróndur Arge

– Tað passar ikki, Sigfríður Clementsen er framvegis venjari hjá B36 og tað liggur fast, sigur Kristian á Neystabø greiður, tá Sosialurin spyr um nakað hald er í søguni um at B36 hevur sagt venjaranum úr starvi.

Sigfríður Clementsen varð í fjør uppsagdur í EB/Streymi og kom aftur til B36 at hjálpa teimum úr niðurflytingarvandanum. Sigfríður var í 2005 og 2006 venjari hjá B36 við góðum úrslitum. Millum annað eydnaðist tað teimum at spæla seg víðari úr fyrstu rundu í UEFA Cup og Champions League, umframt at vinna eitt meistaraheiti.

– B36 hevur ongar ætlanir um at skifta venjara. Eg havi ikki fleiri viðmerkingar til málið enn tað, sigur Bárður Simonsen, sum er stjóri í P/F FC Tórshavn, sum rekur 1. liðið hjá B36.

B36 hevur í ár havt tað trupult í landskappingini. Teir byrjaðu væl og vunnu tríggjar teir fyrstu dystirnar, men síðani tá hava teir ikki vunnið í landskappingini. Teir taptu eisini samanlagt fyri EB/Streymi í hálvfinaluni í steypakappingini.

*trondur@sosialurin.fo*



**SITUR ENN**
*Hóðast vánalig úrslit sigur B36 leiðslan seg framvegis hava álit á Sigfríða Clementsen sum venjara*
*Mynd: savnsmynd*